umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Sunda Kommuna
Oyrarbakkavegur 3
405 Oyrarbakki
Føroyar

Argir hin 11. juni 2026
Málsnr.: 25/31764
Málsviðgeri: Rúna Hjelm

# Avgerð viðvíkjandi umsókn frá Sunda kommunu um loyvi til at víðkað um bátahylin í Hósvík

Umhvørvisstovan hevur tikið avgerð um, at tað sambært § 21, stk. 4 í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting sambært § 21, stk. 2 í somu lóg viðvíkjandi verkætlanini hjá Sunda kommunu um at víðka um bátahylin í Hósvík.

## Umsókn og lýsing av verkætlan

Sunda kommuna hevur við umsókn dagfest 27. november 2025, søkt Umhvørvisstovuna um loyvi til at víðka um bátahylin í Hósvík. Í umsóknini greiðir Sunda kommuna frá, at tað hevur verið ein vaksandi eftirspurningur eftir bátaplássið seinastu árini, og at tað verða fleiri bátapláss og bátarnir fara at liggja betri, tá hylurin verður víðkaður. Ætlanin er at flyta pirin longur út og gera hann beinan við einum knekki (sí mynd 1, 2 og 3).



**Mynd 1** Verandi bátahylur í Hósvík (tekning B-101)




**Mynd 2** Flatmynd av nýggja pirinum, sum ætlanin er at gera í bátahylinum í Hósvík (tekning C-101)

Samlaða víddin av grótútfyllingini á pirinum, sum Sunda kommuna ætlar at gera er 825 $m^2$ og nøgdin, sum eftir ætlan verður løgd í pirin er 5.746 $m^3$ .




**Mynd 3** Tværskuður fyri nýggja pirin á Bátahylinum í Hósvík (tekning F-101)

Við umsóknini eru tekningar og frágreiðingin niðanfyri byggir á upplýsingar frá Sunda kommunu.

**Stutt lýsing av verkætlanini:**

- Fyri at víðka um Bátahylin í Hósvík, hevur Sunda kommuna ætlanir um at taka verandi pir upp og leggja ein nýggjan pir lutvíst yvir verandi pir sambært tekning C-101 (mynd 2).
- Pirurin verður bygdur sum ein grótútfylling, sambært tekning C-101 og F-101 (mynd 2 og 3).
- Nøgdin av gróti, ið skal brúkast til pirin er íalt 5.146 m3.
- Kommunan hevur upplýst, at grótið, sum nýtt verður til útfyllingina kemur lutvíst frá verandi piri, sum verður tikin upp, og frá útstykking omanfyri bátahylin. Somuleiðis er upplýst, at tá útstykkingin verður gjørd, verða elektriskar perlur nýttar til at spreingja við[1]. Tann elektriskt leiðandi spreingitráðurin er úr metalli og klæddur við tunnum plasti. Tráðurin søkkur, saman við grótinum, og fer tí ikki at flóta upp og dálka strendurnar.
- Staðsetingin av verkætlanini og dýpið er lýst í tekningunum B-01 og C-01 (mynd 1 og 2).
- Eingin fjøra er í økinum, tí alt økið innanfyri er tikið til bátahyl.
- Biofar hevur gjørt eina lívfrøðiliga kanning av plantum, djórum og umhvørvinum í økinum niðanfyri sjóvarmálanum.
- Ætlanin er at hava sama havnavirksemi í bátahylinum, sum áður.
- Arbeiðið verður eftir ætlan gjørt í 2026.

## Lívfrøðilig kanning

Viðfest umsóknini sendi Sunda kommuna frágreiðing við lívfrøðiligari lýsing av djórum og umhvørvinum niðanfyri sjóvarmálan uttan fyri verandi pir í Bátahylinum í Hósvík. Tað er Biofar, sum hevur gjørt kanningina, sum hevur heiti: *Sunda kommuna – økið við bátahylin í Hósvík. Lívfrøðilig støðulýsing av botninum* (frágreiðing nr.: 2025-052).

Kannaða økið er umleið 3.700 $m^2$. Dentur er lagdur á at kanna tann partin av økinum, sum er natúrligt búlendi. Kannaða økið gongur út frá landi við norðara arm á bátahylinum og síðani í ein boga inn móti pirinum eystan fyri bátahylin.

Økið, sum er kannað, liggur vart fyri havaldu og brimi í eini vík í Sundalagnum. Sjóvarfalsrák er suður og norður í Sundalagnum, men tað er veikt innast í Hósvík, har bátahylurin er staðsettur.

Fram við útfyllingini á verandi bátahyli dýpist tað líðandi út á umleið 5 metra dýpi, sum er størsta dýpið. Botntilfarið er fínur sandbotnur, íblanda silt og lívrunnið tilfar. Botnurin er klæddur við sukurtara. Bátaferðslan hevur ført við sær, at botnurin er meira sjónskur, har innsiglingin er, annar sæst ongin sjónlig ávirkan av mannaelvdum virksemi.

[1] Kemikalii, sum sprongt verður við hevur heiti: Rockstar II og Rockstar III (sí Vørudatablað).
file:///C:/Users/ln25487/AppData/Local/Microsoft/Windows/INetCache/Content.Outlook/2S5AKOR7/20250603_151457.pdf

50 djórasløg blivu staðfest við sýnistøku við grabba, og 52 sløg blivu staðfest við eygleiðing av kavarum, 8 av hesum sløgum eru staðfest í báðum kanningum. Sostatt eru minst 94 sløg staðfest í kanningunum. Størsti partur av djórasløgunum búleikast niðri í botntilfarinum.

Kanningin staðfestir eitt búlendi, *Laminaria saccharina and Chorda filum on sherltered upper infralittoral muddy sediment* (SS.SMP.KSwSS.LsacCho), sum er flokkað sambært altjóða skipanini hjá JNCC.

Niðurstøðan í kanningini hjá Biofar er, at búlendi SS.SMP.KSwSS.LsacCho (s. 4):

> "er vanligt á støðum, sum eru vard ímóti alduávirkan, tað verið seg í altjóða- og føroyskum høpi. Av tí at tað dýpist ógvuliga líðandi út frá bátahylinum, vil SS.SMP.KSwSS.LsacCho búlendi óivað fara at fevna økið uttanfyri ein ætlaðan víðkaðan bátahyl í Hósvík. Mett verður at búlendi helst er at finna aðrastaðni í Sundalagnum. Einki sjáldsamt slag ella sjáldsamt fyribrigdi kundi staðfestast í samband við hesa kanningina."

Somuleiðis metir Biofar at djóralívið við tíðini fer at koma aftur í skráan frá útfyllingini av nýggja pirinum.

Sostatt vísir kanningin hjá Biofar at búlendi helst er vanligt í Sundalagnum, og at onki av djórasløgunum, sum kanningarnar staðfestu í økinum, eru hótt.

## Málsviðgerð

Sambært § 21, stk. 2 í havumhvørvislógini skulu góðkenningar av verkætlanum sambært § 21, stk. 1, sum t.d. havnaútbyggingum, ikki gevast fyrr enn mett er, at avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi eru munandi.

Ætlaða verkætlanin hjá Sunda kommunu at víðka um Bátahylin í Hósvík, verður gjørd í einum øki, har fjøran longu er tikin uppí verandi bátahyl, og tí er náttúran í bátahylinum og fram við verandi piri longu órógvað.

Av tí at kommunan ætlar at víðka bátahylin, soleiðis at hann fevnir um eitt størri havøki, fekk kommunan álagt at gera eina minni kanning av náttúru og djóralívi í økinum, sum ætlanin nú er at byggja út yvir[2].

Kanningin hjá Biofar vísir, at nakað av djóralívi er í mórubotninum og í taranum í órørda økinum fram við verandi piri, men onki av eygleiddu sløgunum verða mett sum sjáldsom ella hótt. Mett verður somuleiðis at djóralívið við tíðini fer at koma aftur í skráanum frá útfyllingini av nýggja pirinum.

---

[2] Í vegleiðing 16/2016, við heitinum: Vegleiðing um góðkenning og umhvørvisárinsmeting av verkætlanum á sjónum og í sjóvarmálanum, setir Umhvørvisstovan eitt nú krav til at stutt lívfrøðilig lýsing skal gerast av plantum, djórum og umhvørvinum í økinum.
Leinki til vegleiðing 16/2016: https://www.us.fo/wp-content/uploads/2024/01/Leidbeining-ver-3-2024-um-godkenning-og-arinsmeting-smb-HUVL.pdf

Kommunan upplýsir somuleiðis at ætlanin er at nýta grót til útfyllingina, sum er sprongt við elektriskum perlum, har plasti ikki fer at flóta upp og dálka strendurnar. Mett verður tí ikki, at tørvur er á at gera eina umhvørvisgóðkenning av verkætlanini.

Loyvi varð 24. apríl 2026 sent til Sunda kommunu til hoyringar, sum ongar viðmerkingar hevði.

## Avgerð

Grundað á upplýsingar frá Sunda kommunu og frágreiðing nr. 2025-052 hjá Biofar av botni og plantu- og djóralívi uttan fyri verandi bátahyl í Hósvík metir Umhvørvisstovan, at ætlaða útbyggingin av havnarlagnum ikki fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Avgerð verður tí tikin um, at tað sambært § 21, stk. 4 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum, ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting sambært § 21, stk. 2 í lógini.

Treytir fyri avgerðini er, at:

- verkætlanin verður framd, sum lýst í umsóknartilfarinum frá Sunda kommunu
- loyvið er tíðaravmarkað til 1. september 2028

## Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýrisfólkið í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til Umhvørvismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Møguligar kærur skulu sostatt vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 9. juli 2026. Umhvørvisstovan sendir møguligar kærir víðari til Umhvørvismálaráðið.

Vinaliga

| | |
|---|---|
| Sigga Jacobsen<br>Deildarleiðari | Rúna Hjelm<br>Málsviðgeri |